## Kurt tapti stórt



Elnesvågen/O, við Kurt Mørkøre á odda, stríðist í løtuni fyri at vinna sær sætið í triðbestu norsku deildini. Liðið misti tó týðandi fet í gjár, tá teir taptu stórt móti oddaliðnum. Eykaliðið hjá Molde staðfesti dyggiliga oddasessin, tá teir vitjaðu á Elnesvågen Stadion. Gestirnir vunnu sannførandi við 6-0. Elnesvågen er tó framvegis á fjórða plássinum við 21 stigum, við tólv stigum til oddaliðið. Træff er nummar tvey við 28 stigum.

## Einki tilboð frá Superliguni

Christian Lamhauge Holst var í gjár kunngjørdur sum nýggjur Silkeborg-leikari. Gitingar hava verið, hvar framtíðin hjá føroyska landsliðsleikaranum var, har søgur hava verið um áhuga úr bestu deildini. Men Holst staðfestir, at at so var ikki. – Prátini, sum eg havi havt við Superligu-lið, vóru ikki ítøkulig. Eg kund hugsa mær at fingið framtíðina upp á pláss sum skjótast, og eg metti, at Silkeborg hevði nógv áhugavert at bjóða mær, sigur Christian Lamhauge Holst, sum skiftir til Silkeborg, tá sáttmáli hansara við Lyngby gongur út um jólini.

# Hetjan úr Beograd

